# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Arbeiðarafeløgini heita á løgtingið:

# Skattalætta til láginntøkur - ella einki

**Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðarafeløgini í Havn og Klaksvík heita nú á løgtingið um at avtaka ætlaða skattalættan fyri 2008. Hann er sosialt órættvísur og gevur eini vanligari arbeiðarainntøku einans 700 kr. í lætta, meðan ein dupult so stór inntøka fær 6000 kr.**

SKATTALÆTTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Arbeiðarafeløgini í Føroyum hava sent út eina yvirlýsing, har heitt verður á Føroya løgting um at avtaka skattalættan fyri 2008.

Tað kann í sjálvum sær ljóða undarligt, at fakfeløg takka nei til skattalætta, men í hesum førinum meta tey ikki, at nevndi lætti til arbeiðaran er »stríðið vert«.

Ein einføld útrokning vísir, at ein vanlig arbeiðaraløn bert verður ávirkað 700 kr. um árið positiva vegin av ætlaða skattalættanum.

- Ein vanligur arbeiðari, sum fær hvønn einasta tíma í árinum, forvinnur 207.000 kr. Ætlaði skattalættin hjá hesum merkir altso 700 kr. í lætta um árið. Men taka vit eitt dømi, har ein forvinnur tað dupulta av eini arbeiðsmannaløn, fær viðkomandi 6000 kr. í skattalætta. Og tað er bara við til at økja um gjónna millum lág- og hálønt, sigur Sonja Jógvansdóttir, samskiftisráðgevi hjá FA og HA.

Sambært Sonju er talan tí um so lítlan lætta hjá vanligum arbeiðarum, og lutfalsliga stórum hjá teimum betri løntu, at peningurin nógv heldur átti at verið nýttur til onnur og meiri gevandi endamál.



*Sonja Jógvansdóttir er samskiftisráðgevi hjá FA og HA*

## Kanna sosialu viðurskiftini

Ávaringar eru allastaðni frá um nógva ferð á føroyska búskapinum, og tí er stundin ikki hin rætta at geva skattalætta, vísa fakfeløgini á. Talan er heldur ikki um rættiligan skattalætta til vanliga arbeiðaran.

- Stundin er komin til politiskt inntriv at minka um gjónna millum há- og láglønt, og tí hevði ein rættiligur skattalætti til vanliga arbeiðaran komið ógvuliga væl við. Men tað uppskotið, ið fyriliggur, økir bara um sosialu gjónna í samfelagnum, og tí er betur, at uppskotið verður tikið aftur, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Hon vísir á, at politiskt hevur ongatíð verið áhugi fyri at vita, hvussu sosialu viðurskiftini eru í samfelagnum. Alskyns kanningar verða gjørdar, og alt gott um tað, men áhugi átti at verið fyri sosialu viðurskiftunum í landinum.

Eingin rættiligur skattalætti hevur verið givin í Føroyum síðani 2003. Okkurt av inntrivunum í skattapolitikkinum er tó kærkomin, eitt nú at skavað er av toppskattinum á meðalinntøkunum. Men skattur er eitt gott amboð at javna út í samfelagnum. Tíverri hevur sitandi samgonga valt ikki at nýta hetta amboð til fyrimunar fyri meðal- og láginntøkurnar, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Tað eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmanna- og –kvinnufelag, og Klaksvíkar Arbeiðsmanna- og –kvinnufelag, ið hava sent út yvirlýsingina.





Framsýning av
Elipse stellinum



Í sambandi við yrkisroynd mína bjóði eg tykkum øllum inn á gólvið hjá Ide Møblum

Sýnt verður fram Elipse stellið, sum fæst í 6 ymiskum deilum.



Bollar og heitt kakao er at fáa. Børnini fáa eisini ballónir.




Kapping

Hvussu nógvir ymiskir deilir eru til Elipse stellið?

☐ 4 deilir ☐ 6 deilir ☐ 8 deilir

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Tlf. nr: ____________

Lat seðilin inn til Ide Møblar fríggjadagin 23. ella leygardagin 24. mars áðrenn kl. 14.00.

Drigið verður um eitt gávukort áljóðandi kr. 1.000,-

4 stk. døgurða tallerkar
NÚ 129,- SPAR 67,-

4 stk. náttúrða tallerkar
NÚ 119,- SPAR 37,-





Falkavegur
100 Tórshavn
tel 35 46 80
faks 35 46 81

Mánadag – hósdag ...09.00 – 17.00
Fríggjadag ................09.00 – 18.00
Leygardag .................10.00 – 14.00

IDEmøblar
VIT HAVA HEILT VÍST EISINI OKKURT TIL TÍN